From:	Landssjúkrahúsið
To:	Umhvørvismálaráðið
Cc:	Steinar Eirikstoft; Jóan Símun Saltá; Bjørgfríð Ludvig; Andreas Sjóvará; Heilsumálaráðið; Jóannes N. Dalsgaard
Subject:	SV: Uppskot til løgtingslóg um at lata Húsalánsgrunninum ræði yvir Eiragarði 2 - til ummælis
Date:	fríggjadagur, 25. juli 2025 11:24:30
Attachments:	image003.png image004.png image005.png

Til Umhvørvismálaráðið

Viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um at lata Húsalánsgrunninum ræði yvir Eiragarði 2.

§1 skt. 2
"Kapittul 3. Serligar viðmerkingar": §1 skt. 2 vísir á tey áhugamál, Sjúkrahúsverkið hevur í Eirargarð 2.
Sjúkrahúsverkið hevur virksemi í niðastu hædd í bygninginum, har vit hava sjúkraflutningsakfør, har sjúkraviðgerðar húsast og har vaktsentralurin hjá Sjúkraflutningstænastuni er. Bygningurin má skipast soleiðis, at hetta virksemi kann halda fram.

Vísandi til §1 skt. 1:
" Húsalánsgrunnurin hevur ræðið yvir bygninginum Eirargarður 2 í Tórshavn og ***kringliggjandi øki***, sum náttúrliga er knýtt at bygninginum, sí tó stk. 2".
Her er týdningarmikið at vísa á, at hædd má takast fyri sjúkraflutningstænastuna í samband við ***kringliggjandi øki.*** Neyðugt er, at sjúkraflutningsakfør kunnu brúka innkoyringina frá Eirargarði inn á Eirargarð 2, umframt at sjúkraflutningstænastan hevur ræði á økinum millum høga bygningin á Eirargarði 2 og tann lægra bygningin (garagan), sum liggur útnyrðing norðan móti Frælsinum. Harumframt má sjúkraflutningstænastan varðveita ræði á økinum millum garaguna og út á vegin við Frælsinum.

Annað
Umframt hetta vilja vit vísa á, at skal bygningurin brúkast til bústaðarleigumál, verður neyðugt við fleiri parkeringsplássum. Sum er, eru parkeringspláss ein mangulvøra í økinum Eirargarður. Við einari útvegan á 43 til 55 lestrar- og ungdómsbýli fer tørvurin á parkeringsøki at vaksa munandi.

Vinaliga
Ari av Rana
Samskiftisfulltrúi, Stjórnarskrivstovan
Tel. +298 304592

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49 · FO-100 Tórshavn
Tel. +298 304500 · www.sjukrahus.fo

Fra: Andreas Sjóvará <Andreas.Sjovara@hmr.fo>
Sendt: 25. juli 2025 08:51
Til: Landssjúkrahúsið <ls@ls.fo>
Cc: Steinar Eirikstoft <steinar@ls.fo>; Jóan Símun Saltá <joan.simun.salta@ls.fo>; Bjørgfríð Ludvig <Bjorgfrid@hmr.fo>
Emne: Uppskot til løgtingslóg um at lata Húsalánsgrunninum ræði yvir Eiragarði 2 - til ummælis
Prioritet: Høj

Til Landssjúkrahúsið

Uppskot til løgtingslóg um at lata Húsalánsgrunninum ræði yvir Eiragarði 2 verður við hesum sent Landssjúkrahúsinum til ummælis.

Heitt verður á Landssjúkrahúsið um at senda møguligar viðmerkingar beinleiðis til Umhvørvismálaráðið og við avrit til Heilsumálaráðið **í seinasta lagi í dag, 25. juli kl. 12**.

Vinarliga

Andreas Sjóvará
Fulltrúi

73 40 15
@ andreas.sjovara@hmr.fo

HEILSUMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Health

Heilsumálaráðið
30 40 50
@ www.hmr.fo

Fra: Jóannes N. Dalsgaard <JoannesNd@umhvorvi.fo>
Sendt: 24. juli 2025 13:41
Til: Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Bjarni Askham Bjarnason <bab@fmr.fo>; Atli Suni Leo <Atli@fmr.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; Bjørgfríð Ludvig <Bjorgfrid@hmr.fo>; Sigurð í Jákupsstovu <Sigurdj@us.fo>; us <us@us.fo>; Malene Egeberg Jacobsen <malenej@us.fo>; bustadir@bustadir.fo; tesa@estunlar.fo; Jógvan Ósá <Jogvan@bustadir.fo>
Cc: Margit Stórá <MargitS@umhvorvi.fo>; Pól E. Egholm <pole@umhvorvi.fo>; Hilmar Høgenni <HilmarH@umhvorvi.fo>
Emne: Uppskot til løgtingslóg um at lata Húsalánsgrunninum ræði yvir Eiragarði 2 - til ummælis
Prioritet: Høj

Góðan dag

Viðfest verður sent tykkum til ummælis uppskot til løgtingslóg umat geva Húsalánsgrunninum ræðisrætt til bygningin Eirargarður 2 í Tórshavn.

Løgtingslógaruppskotið skal gera tað møguligt hjá Húsalánsgrunninum at gera bygningin til lestrar- og ungdómsbústaðir at leiga út.

Ætlanin er at leggja uppskotið fram á Ólavsøku. Skotbráðið er tí ógvuliga stutt. Umhvørvismálaráðið heitir á tykkum um at senda okkum tykkara viðmerkingar **ikki seinni enn í morgin fríggjadagin 25.07.2025 kl. 12:00**.

Vinaliga sendi viðmerkingar tykkara til undirritaða joannesnd@umhvorvi.fo.

Hava tit spurningar kunnu til venda tykkum til Hilmar Høgenni deildarstjóra á tlf. 558090.

Vegna Umhvørvismálaráðið
Jóannes N. Dalsgaard
fulltrúi

Telefon: +298 358700
Fartelef.: +298 734061
joannesnd@umhvorvi.fo

UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Environment

Umhvørvismálaráðið
Gongin 7
Postrúm 377
FO-110 Tórshavn
Føroyar

Telefon: +298 358700
www.umhvorvi.fo
umhvorvi@umhvorvi.fo

FYRIVARNI:
Innihaldið í hesum telduposti er ætlað omanfyri nevnda móttakara, og kann innihalda upplýsingar veittar í trúnaði. Um tygum ikki eru rætti móttakarin, gera vit vart við, at tað ikki er loyvt at avdúka, margfalda, spjaða ella á annan hátt at nýta innihaldið. Um tygum, orsakað av mistaki, hava móttikið henda teldupost, hóast hann ikki er ætlaður tygum, setið tygum vinarliga í samband við meg gjøgnum telefon ella við telduposti skjótast gjørligt. Hesin teldupostur myndar ikki nakað tilboð ella játtan av nakrari sáttmálabundnari avtalu. Slík tilboð ella játtanir mugu fráboðast í brævi ella øðrum skrivi.

CONFIDENTIALITY NOTICE:
The information contained in this email is intended for the named recipient only as the contents may be confidential. If you are not the intended recipient, we must inform you that you are not permitted to reveal, copy, distribute or otherwise use the contents. If you have received this email by mistake although it is not meant for you, please contact me by telephone or by email as soon as possible.

This email does not represent any offer or acceptance of any contractual agreement. Notification of any such offer or acceptance must be given by letter or in other written format.